Ár 2008, hin 4.mars kl. 17.30 hevði Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá.

Erik Andreasen møtir fyri Jákup Mikkelsen.

9.
2008-19-017 Signhild V. Joensen fastur býráðslimur – býráðið
Nú Torleif Sigurðsson, býráðslimur, er farin, tekur Signhild Vilhelmsdóttir Joensen, Trøllanes, sæti sum fastur býráðslimur restina av hesum býráðsvalskeiðnum.

Býráðsins samtykt:
Staðfest

10.
2008-19-015 Farloyvi vegna tingarbeiði – Eyðgunn Samuelsen
Vegna tess at Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, hevur tikið sæti á løgtingi, søkir hon um farloyvi frá býráðsarbeiðnum, og at næsti persónur á lista Javnaðarfloksins tekur sæti í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Staðfest

11.
2008-19-023 Farloyvi vegna tingarbeiði – Jákup Mikkelsen
Vegna tess at Jákup Mikkelsen, býráðslimur, hevur tikið sæti á løgtingi, søkir hann um farloyvi frá býráðsarbeiðnum, og at næsti persónur á lista Fólkafloksins tekur sæti í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Staðfest

12.
2008-19-024 Umval av 1. varaborgarstjóra
Vegna tess at Jákup Mikkelsen, 1. varaborgarstjóri, hevur tikið sæti á løgtingi, hevur hann sagt frá sær sessin sum 1. varaborgarstjóri, ið sostatt skal veljast av nýggjum, galdandi fyri restina av inniverandi býráðsvalskeiði.

Býráðsins samtykt:

Samtykt við 6 atkvøðum - Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian Fr. Olsen, Atli S. Justinussen, Erik Andreasen, Jórun Høgnesen og Rani Nolsøe at velja Kristian Fr. Olsen til 1. varaborgarstjóri.

13.
2008-19-009 Umval av nevndum v.m.
Vegna tess at Gunvá við Keldu, býráðslimur, í skrivi tann 30. januar 2008 hevur boðað frá, at hon ikki longur verður ein partur av samgonguni millum Fólkaflokkin og Tjóðveldi í Klaksvíkar Býráð, er hon ikki longur partur av valbólki býráðsmeirilutans, og verða tær nevndir, har hon umboðar býráðsmeirilutan nú at velja av nýggjum, galdandi fyri restina av býráðsvalskeiðnum.

Talan er um fylgjandi nevndir, sum við hesum verða at velja av nýggjum samsvarandi nýggja býtinum millum valbólkarnar í býráðnum.

Samstundis verður býráðið at staðfesta, at Signhild V. Joensen, ið nú tekur sæti sum fastur býráðslimur fyri Torleif Sigurðsson, sála, tekur sæti í teimum nevndum, har hann var limur.

Nevndirnar, har Eyðgunn Samulensen og Jákup Mikkelsen, býráðslimir í farloyvi, verða somuleiðis at velja av nýggjum, galdandi so leingi hesi eru í farloyvi.

Talan er um hesar nevndir, ið skulu veljast av nýggjum:

Fíggjarnevndin (5 limir)

Steinbjørn O. Jacobsen
Kristian Fr. Olsen
Erik Andreasen
Tummas Lervig
Kristian Eli Zachariassen

Tekniska Nevnd (5 limir)

Kristian Fr. Olsen
Rani Nolsøe
Jórun Høgnesen
Signhild Joensen
Hans Arne Bertholdsen

Mentanarnevndin (5 limir)

Erik Andreasen
Rani Nolsøe
Jórun Høgnesen
Signhild Joensen
Kristian Eli Zachariassen

Byggi- og Býarskipanarnevndin (5 limir)

Atli S. Justinussen
Rani Nolsøe
Erik Andreasen
Hans Arne Bertholdsen
Tummas Lervig

Sosiala Nevnd (5 limir)

Jórun Høgnesen
Atli S. Justinussen
Erik Andreasen
Tummas Lervig
Hans Arne Bertholdsen

Heilsu- og Umhvørvisnevndin (5 limir)

Rani Nolsøe
Atli S. Justinussen
Signhild Joensen
Tummas Lervig
Magnus Magnussen

14.
2008-19-025 Barnaverndarnevndin – umval av nevndarlimi
Í sambandi við at Signhild V. Joensen, limur í barnaverndarnevndini, hevur tikið sæti sum fastur býráðslimur, verður annar persónur at velja í nevndina í hennara stað.

Býráðsins samtykt:
Terje Kjærbo varð valdur í nevndina

15.
2008-15-001 Umsókn um sundurbýti – matr. nr. 1463
Vístverður til umsókn frá eigaranum um sundurbýti av

matr. nr. 1463. Talan er um sundurbýti av matr. nr. 1463, í samband við eina íbúðarverkætlan.

Tekniska Umsiting mælir til at játta sundurbýti.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. 08.02.08

Býráðsins samtykt:
Samtykt

16.
2008-21-002 Parkering av størri akførum.
Uppskot er frammi um at leggja norðara partin av ferjuleguøkinum av til parkering av stórum bilum. Talan er um økið fram við suðurmarkinum hjá Shell, har pláss er fyri 10 bilum.

Tekniska Umsiting mælir til, at parkeringsbásar verða avmerktir. Fyribils verður mælt til, at parkeringin verður almenn.

Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum frá T.U. 11.02.08. Samstundis verður mælt til, at kanna verður, um sama loysn kann verða á uppfylta økinum sunnan fyri hjá NFCS.

Ein meiriluti í Havnanevndini: Atli S. Justinussen, Kristian Fr. Olsen og Jórun Høgnesen taka undir við tilmæli frá T.U. 11.02.08 og FeN 12.02.08 við einari royndartíð uppá 1 ár, meðan arbeitt verður við endaligari loysn.

Eini minniluti í Havnanevndini: Hans Arni Bertholdsen og Kristian Eli Zachariassen mælir til at økið við bátahylin á Borðoyavík verður nýtt fyribils til endalig ætlan fyriliggur.

Kristian Fr. Olsen og Rani Nolsøe í Teknisku nevnd taka undir við tilmæli frá T.U. 11.02.08.

Hans Arne Bertholdsen tekur undir við tilmæli frá [minnilutanum í] (red.) Havnanevndini.

Býráðsins samtykt:
Meirilutatilmælið samtykt - 6 atkvøður fyri (Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian Fr. Olsen, Atli S. Justinussen, Erik Andreasen, Jórun Høgnesen og Rani Nolsøe) og 5 ímóti (Hans Arne Bertholdsen, Signhild Joensen, Tummas Lervig, Kristian Eli Zachariassen og Gunvá við Keldu)

Fundurin lokin